## DAGSINS MEINING

# Politiskt arvastríð

Orðaskiftið um fíggjarlógina 2004 gav eina rættiliga greiða heildarmynd av tí, sum skilur andstøðu og samgongu. Heildarmyndin vísti eisini eina andstøðu, sum støðugt var í álopi, meðan samgongan meira ella minni var í verjustøðu. Tað vil so vera, fyri tað fyrsta tí, at tí samgongan er nýggj og valla hevur funnið síni bein. Fyri tað annað tí, at fíggjarlógaruppskotið veruliga hevur nakrar veikleikar, sum gav andstøðuni høvi til at loypa á. Hinvegin eigur andstøðan sum kunnugt ein stóran part av fíggjarlógaruppskotinum, sum í stóran mun er arvur frá gomlu samgongu. Sostatt vóru álopini ikki uttan eitt vet av hykli, og orðaskiftið gjørdist mangan eitt slag av politiskum arvastríði.

Tað var andstøðan, sum støðugt var í álopi. Stundum tóktust álopini púra grundleys og ósamskipað og stundum hevði andstøðan grein í sínum máli. Tað, sum kundi virkað ósamskipað, var orðadrátturin kring blokkniðurskurðin. Stóri andstøðuflokkurin tvíhelt um tað skilagóða í at skerja blokkin og serstakliga fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin harmaðist um, at ikki allar blokkurin var burtur. Hetta er skilligt, tí hetta er Tjóðveldisfloksins politikkur. Tað, sum ikki hekk saman hjá Tjóðveldisflokkinum her, var tann samstundis áhaldandi atfinningin, um at ov nógv var spart. Eftir situr lurtarin við spurninginum: hvar hevði verið skorið, um allur blokkurin var burtur?

Hinvegin hevur hesin flokkur rætt í sínum atfinningum til sparingarnar á mentanar- og granskingarøkinum. Hesar sparingar tykjast tilvildarligar og ógrundaðar, so mikið meira sum at núverandi stjórnarflokkar í valstríðinun eins og stóri andstøðflokkurin løgdu stóran dent á júst hesi øki. Tí mugu vit tíverri geva Tjóðveldisflokkinum rætt í, at her er lopið á, har garðurin er lægstur, og fer hetta at koma serstakliga Javnaðarflokkinum aftur um brekkur, um ikki økið verður raðfest hægri á fíggjarlógini fyri 2005. Ásannast má, at samgongan ikki kundi koma við skilagóðum grundgevingum fyri sparingunum á granskingar- og mentanarøkinum. Her var størsti veikleikin hjá samgonguni undir orðaskiftinum, og hetta eigur at geva samgonguni nakað at hugsa um.

Vit mugu heldur ikki gloyma, at júst núverandi løgmaður undir valstríðnum legði stóra áherðslu á tann týdning, sum eitt nú granskingin hevur fyri at kunna menna vinnuna uppá longri sikt. Tað var skilagóð tala tá og átti at verið eins skilagóð tala nú, tá tað ræður um at seta orðini í verk. Vónandi hevur samgongan tikið atfinningarnar til eftirtektar, soleiðis at broytingar verða gjørdar í fíggjarnevndarviðgerðini og til ta næstu fíggjarlógina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føroyskur blíðskapur

**Jens Chr. Carlsson**
*Tórshavn*



Mikið rumbul stóð um starvssetanina av landsfornfrøðinginum, sum m.a. hevði við sær, at braneggjaða landsstýriskvinnan fekk sekkin, fyri ikki at hava fylgt almenna starvssetanarpolitikkinum hjá landsstýrinum. (Sum um nakar politikkur yvirhøvur var!) Maðurin varð starvssettur.

Harragud, hann hevði søkt starvið, fekk tað og byrjaði at arbeiða. Tað lá eingin ábyrgd á honum fyri tann hurlivasa, sum stakk seg upp í kjalarvørrinum av tí politisku avgerðini, sum tikin var.

Hann hevði og hevur krav upp á rættvísa viðferð. Uppaftur meira áttu vit at vanda okkum, tá tað ræður um ein mann, ið tímir at koma uttanífrá til klettarnar at arbeiða við føroyskari fornfrøði. Hvar bleiv okkara blíðskapur sum fólk av, sum vit ofta erpa okkum av?

Eg skal ikki gera meg klókan uppá, um avgerðin at seta hann fram um ein føroyskan fornfrøðing var røtt út frá førleikanum hjá teimum báðum. Tað er ikki relevant longur. Tá maðurin er settur, er hann settur, og hevur krav uppá, í friði og náðum at sleppa at vísa, hvør dugur er í honum. Er hann sloppin tað? Nei, so langt ífrá!

Hugsa tær at byrja í einum nýggjum starvi sum almennur stovnsleiðari, har móttøkan er so kaldlig, at starvsfólkini nóg illa siga góðan dag og vælkomin. Onkur vendir reyv, onkur mutlar í ópleygaða skeggið, meðan illviljin lýsir av øðrum. Ikki er hetta júst til nakran sóma fyri okkum føroyingar. Ein stór skomm, serliga fyri Fornminnissavnið.

Sum um tað ikki var nóg mikið við hesi móttøkuni. Nú stendur at lesa í bløðunum, at starvsfólkini framvegis ikki binda frið. Nú hava tey kært sín leiðara fyri Mentamálaráðið. Gudarnir skulu vita fyri hvat. Eingin kann taka hetta fyri fult og ein spyr seg sjálvan, hvat tað næsta tiltakið verður hjá teimum.

Hvussu skal maðurin yvirhøvur sleppa at arbeiða undir slíkum korum? Hava vit havt tað so fram úr gott fornfrøðiliga sæð undir undanfarna landsfornfrøðingi, sum hevði starvið í 20 ár ov leingi og hvørs aðalmerki var, at einki hnedi og einki skuldi henda. Hann snorksvav og fekk einki av skafti. Nú sigst at hann fyri fyrstu ferð, síðani hann kom á Fornminnissavnið at arbeiða, er vaknaður til »dáð« og stendur á odda í herferðini at rudda hendan »formasteligе« danskaran burtur, tí harra Thorsteinsson ikki fekk »sín« eftirmann settan sum landsfornfrøðing.

Nei, honum eigur í hvussu so er ikki at verða lurtað eftir. Helst er hann sovnaður við onkrum gomlum fornluti á skrivaraborðinum. Lat hann bert sova í friði, so ger hann í minsta lagi ikki fortreð.

### Eini ráð til landsfornfrøðingin

Landsfornfrøðingurin sigst nú vera farin í holt við at kanna, um eitt gamalt, ússaligt hús í miðbýnum skal friðast.

Vælsignaður, lat teg ikki lokka til slíka býtta avgerð, tí tað er ein fjald dagsskrá aftanfyri at fáa teg til slíkt tvætl. Tað hevur einki við Anton Degns hús at gera, men hugskotið er at fáa landsfornfrøðingin at vassa út í óføri, so tað slepst av við hann.

Tað skuldi ikki undrað meg, at »medarbeiðararnir« á Fornminnissavninum við heilum huga taka undir við tær, at her má friðast.

Lat teg heldur ikki misnýta av onkrum óseriøsum býráðspolitikara í Havn, sum hoyrir til »gadens parlament«, og hvørs einasta endamál er at útvega sær nakrar atkvøður, so sessurin er tryggjaður eisini eftir næsta val og nøkur oyru koma í kassan tey næstu 4 árini.

Býráðið hevur løgfrøðiliga ongan møguleika fyri at sýta byggiloyvi ti leitt nýtt hús og at tað gamla verður niðurrivið.

Hvat er so til ráða at taka, tá lógin forðar býráðspolitikaranum og hann slotar, at her eru nakrar atkvøður at heinta til komandi val.

Vit mugu fáa landsfornfrøðingin inn á vøllin, so eru vit fríir fyri hesum máli. Málið steðgar so umsitingarliga í býráðnum, tí tað er í hondunum á friðingarmyndugleikanum. Helst arbeiðir hann so seint, at avgerðin hjá honum kemur eftir valið og tá er tað fullkomiliga líkamikið, hvør niðurstøðan er.

Eitt hús, sum einki er eftir av av fornum, stendur har og gløðir. Um nakar yvirhøvur veit hvør Anton Degn var, er í dag kanska líkamikið, men hví eitt hús bert skal friðast, tí at Anton Degn hevur búð har, nei, tað skilja vanlig fólk ikki, tí har er einki fornfrøðiligt virði í hasum »umvældu« húsunum. Tak og flyt tey út á Reyn ella annað stað, um tit veruliga halda at nakað virði er í teimum yvirhøvur. Umhvørvið har á staðnum er langt síðani oyðilagt og eitt nýtt hús hevði bert fríðkað miðbýin. Einki fornfrøðiligt atlit er at taka.

Fari tí at geva okkara landsfornfrøðingi tey ráð, at hann vandar sær í hesum máli, at hann ikki dansar eftir nøkrum látipípum, sum hann ikki veit hvør blæsur í. Tað finnur hann helst ikki útav, fyrr enn ov seint er.







**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ein heilsan til tey góðu og reinu í samfelagnum

**Rógvi L. Svøðstein**

Hvørjir eru møguleikarnir hjá samkyndum, sinnisveikum, rørslu- og seinmentum at stíga á eitt hátignarpláss, har allur rættur er komin frá teimum rættindum, sum í 17. øld vórðu ritað við vápnum, ið stolt vórðu havd upp í loftið til tess at verja rættin hjá tí einstaka menniskjanum til lív, kyn, samvitsku, talu- og samkomurætt, ið eru innan teim siðum og skikkum, sum ikki eru næstra hennara ella hansara til bága. Og tó, hvar er hesin samhugin, ið er sagdur at renna í æðrum okkara? Tí fyri tíð síðan var at hoyra og síggja í prent- og loftmiðlunum, at fólk høvdu savnað saman undirskriftir til tess at nokta, at ein verkætlan, ið var til tey, ið ikki eru eins og tey mongu í samfelagnum, skuldi steðgast. Tað ræðuliga, ið var ætlað at byggja beint við teirra sjálvsøgdu halguhúsum, var ikki annað enn eitt búfelag til tey, ið eru borin í henda heim við teim – heilum? – ið ikki eru eins næmir sum teir, ið eru meira vanligir at síggja hjá algóðum og sera, sera gløggum menniskjum, t.d. teimum, ið savna inn undirskriftir til tess at prísurin á húsunum ikki skuldi falla í botn av teirri eini grund, at fólk við einum IQ undir miðal møguliga skuldu seta búgv í teirra grannalagi. So eitt hjartaliga tillukku til tykkum øll, ið so væl megnaðu at sýta hesum menniskjum eina tekju yvir »tómu høvdum« teirra. Og er nøkur »vón«, at nøkur menniskju, ið búgva ´her á teim 18 klettunum, síggja, at hættirnir her tæna tí sera, sera kalda málinum, sum arbeiðir á ein slíkan kaldan hátt, ið sigur, at gudur penganna (mammon) hevur nógv størri virði enn menniskju, ið ikki eru so mikið gløgg, at nakar tilfarsligur dugur kann koma undan »teirra dølsku hondum«. So helst áttu vit lagt eitt uppskot fram fyri teir fólkavaldu – her verður serstakliga hugsað um Miðflokkin, ið er ein f... ! – at eingin mamma skal meira eiga tann grundleggjandi rætt at bera barn undir beltinum (her verður ikki hugsað um ta kanning, ið ein mamma fær í boði til tess at síggja til tað fyribrigdi, ið eitur down syndrom), uttan tó at søkt verður um loyvi at fáa eitt barn. Og um loyvi verður givið, skal hon – mamman – verða tvingað at fara undir eitt hav av sárum og eymum kanningum til tess at tryggja, at barnið er heilrunnið! Tí her skulu ongar sjúkur meira oyðileggja tað góða og reina menniskjað, sum betalir nógvar krónur í skatti til samfelagið (Gud). Samfelagið má so at siga rudda alt av vegnum, ið kallast kann ein sjúka, t.e. øll, ið eru samkynd, sinnisveik, ja, og eisini tey við manglandi IQ, stutt sagt alt tað, ið víkur frá tí »vanliga«.

Vit, ið eru »rein og góð«, kastið teir fyrstu steinarar, er ein setningur, ið væl kann verða nýttur til tess at vísa á hesa heldur vanligu mynd, ið er farin fram her á teim 18 klettunum í teirri sokallaðu 20. og 21. hundrað manngóðum øldum okkara. Tó vónandi vil onkur her á klettunum »geva mær eitt hjartans svar uppá«, hví vit menniskju eru so »ónd« ímóti hvørjum øðrum? Og um vit ætla at skapa eitt nýtt einavald, ið er líkt tí, ið var at síggja undir 2. heimsbardaga í tí triðja ríkinum, tá ið 6 milliónir jødar doyðu og av hesum 6 milliónum vórðu uml. 3 milliónir ella so gassaðar av lærusveinunum hjá tí góð- og reinlynta harravaldsmanninum, Adolf Hitler. Ein annar, ið er vorðin ein sera væl kendur maður, eftir at 2. heimsbardagi var av, er læknin í tí mest kendu og óttaðu fangalegu, ið hevur verið at sæð í søgu heimsins. Og er hann – læknin – vanliga nevndur »deyðans eingil«. Ja, er hann nevndur er hann kendur. Men tó er tað alment viðurkent, at hann »var og er« ein sonevndur »miðvillingur«, um ein kann nýta eitt orð, ið ikki er alment gildugt enn! Men ein kann altíð hava ta vón, at tað í tíðum, ið eru at óra í sjónarringinum, verður eitt gildugt orð.

So er nakar, ið megnar at geva mær eitt svar uppá, hvaðan hesin óndskapur kemur, ið vil at vit menniskju skul líða nógv meira enn neyðugt er hjá nøkrum vanligum ella óvanligum menniskum! Og er nøkur grund til at trúgva, at nakar megnar at steðga tí ljóta munninum hjá miðvillingunum, ið bróta ta avtalu, sum vit, Føroya fólk, skrivaðu undir fyri tíð síðan – ein avtala, ið bindur okkum at virða øll menniskju, ja sjálvt tey, ið miðvillingar sýta at síggja sum heilrunnin menniskju! Teir sonevndu kynsvillingar, ið hava alt annað í felag við okkum »vanligu«, enn júst tað, ið verður gjørt kynsliga teirra millum. So miðvillingar hava møguliga sæð, hvat tað er og eru farnir at dáma tað, ið teir sóu í myrkrinum? Tí eitt so sterkt hatur má hava eina grund, og grundin til hatrið kemur vanliga frá kærleikanum, v.ø.o. hjartað, ið er gingið sundur í girndanna eldhav. Tó eg skal ikki loypa fylgi einglanna upp í varg, ið ger tað alneyðuga arbeiði at halda okkum menniskjum burtur frá teim sáru og holdligu hugunum.

**P.S**. Tann, ið dømir, skal verða dømdur!

# Hjálmur bjargar mannalívum

**Tá ein ungur drongur í fjør doyði av løstunum hann fekk, tá hann rendi á við prutli sínum, ynsktu foreldrini, at fólk kundu lata Ferðslutrygd eina peningagávu. Peningurin er nýttur til eina sjónvarpslýsing um at nýta fallhjálm**

**FERÐSLUTRYGD**
*Tíðindaskriv*

– Alt ov ofta síggja vit fólk á skutara ella á prutli, sum ikki eru í hjálmi, og hetta er sera vandamikið. Hagtøl sýna, at í mun til at koyra í bili, er tað 75 ferðir vandamiklari at koyra á prutli ella skutara.

Hetta sigur Ferðslutrygd, sum er farið undir eina herferð til tess at fáa fólk at nýta fallhjálm og trygdarbelti.

Søgan aftan fyri sjónvarpslýsingina er, at ein ungur drongur á heysti 2003 doyði av løstunum, sum hann fekk av ferðsluóhappi. Hann koyrdi á prutli og rendi frontalt í ein garð. Í stoytinum fekk drongurin stóran skaða í høvdið. Umframt tað, fekk hann eisini opið beinbrot. Hendingin fór fram um náttina og av tí at drongurin fall í óvit, var hann ikki funnin fyrr enn góða løtu seinni. Eftir 11 daga langa sjúkralegu andaðist hann á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Drongurin átti hjálm, men tá ið óhappið hendi, var hann ikki í honum. Um hann hevði verið í hjálmi, hevði talan »bara« verið um eitt opið beinbrot.

Undan jarðarferðini boðaðu foreldrini frá, at tey sum vildu senda eina heilsan, kundu geva Ferðslutrygd eina peningagávu. Ferðslutrygd gjørdi av, at nýta innkomna peningin at gera eina sjónvarpslýsing.

Framleiðsluna hevur Kovboy Film við Hans Petur Hansen og Thomas Koba staðið fyri.

# Ferðslutrygd: Upplýsa um fallhjálm og trygdarbelti

**Týsdagin hin 13. apríl, í vikuni eftir páskir, verður aðalorðaskifti løgtinginum um Nullhugsjónina. Í hesum sambandi fer Ferðslutrygd at gera upplýsingarátak í fjølmiðlunum**

**FERÐSLUTRYGD**
*Tíðindaskriv*

Umframt innsløg, sum leggja dent á Nullhugsjónina, verða tvær nýggjar sjónvarpslýsingar at síggja. Onnur er um at nýta hjálm, tá ið tú koyrir á prutli ella skutara og hin um trygdarbelti og ov nógva ferð. Upplýsingarátakið verður eisini í útvarpi og í bløðum. Í komandi viku verður faldari borin til øll húski í landinum.

### 2 sekund - minst til trygdarbeltið

Kanningar vísa, at rennur ein bilur á við 50 km/t, skal eitt fólk, sum er í bilinum, tola eina megi, sum er heili 4 tons, og tað sigur seg sjálvt, at tað megnar eingin. Jú meiri ferð, jú verri verður.

Trygdarbeltið er besta og mest einfalda trygdartiltak, sum bilurin higartil er útgjørdur við og minkar um vandan fyri at verða dripin ella løstaður við 50%. Hetta merkir, at annaðhvørt menniskja, sum er deytt í ferðsluni, og ikki nýtti belti, hevði verið bjargað, um tað sat í belti.

Í ársfrágreiðing landslæknans 2003 stendur, at í tíðarskeiðinum 1986 til 2002 doyðu 63 fólk í ferðsluni í Føroyum. 41 av hesum vóru ikki í belti, og hevði bilbeltið kunnað bjarga um 20 av hesum. Umframt at sita í belti, eru góð ráð altíð at sita upprættur, so at høvdið er so tætt nakkastuðlinum, sum til ber. Nakkastuðulin skal stillast soleiðis, at hann er á hædd við kríllin. Sjónvarpslýsingin er upprunaliga úr Avstralia. Føroysku tillagingina hevur Sjónband staðið fyri.

# Útoyggj ella útdoyggj?

**Jonna Justinussen**

Er hatta mátin, Ábraham Mikladal, at gera tað meira liviligt hjá fólki á útoyggj? Skriva ljót lesarabrøv um sakir, sum ikki viðkoma tær? Spilla fólk út?

Í Mikladali búgva so fá fólk, og tað er ongin loyna, at har er næstan vónleyst at fáa nakað gjørt, tí har er onki fólk at fáa. Sjálvandi skal Mikladals Kommuna leggja saman við Klaksvíkar Kommunu, tá verður Mikladalur ein "býarpartur", har fólk kunnu flyta til, líka so væl sum Trøllanes eisini verður ein "býarpartur". Hetta ynsktu Trøllanesfólk, tá eg búði og var lærari í Mikladali. Annars haldi eg ikki, at har er so nógv at tosa um, tí fleiri fólk í Mikladali, og onkur á Trøllanesi, búgva longu í Klaksvík.

Eg haldi eisini, at tú skyldar øllum lesarum at fortelja teimum, at tú ert maður Olgu Biskopstø, sum er forkvinna í Útoyggjanevndini. Tástani gevur títt skrivarí meining, tí nú kann ein og hvør rokna út, hvussu tit, topparnir í Útoyggjanevndini, arbeiða fyri at gera tað liviligt hjá fólki á útoyggj. Eg veit, hvat eg tosi um, eg eri nevniliga flutt haðani, og eg vóni ikki, at landsstýrismaðurin í útoyggjamálum (og harvið vit øll) gevur tykkum nakra samsýning fyri tykkara "arbeiði".